## Triathlon verður sunnudagin

**Komandi sunnudag skipar Føroya Triathlonfelag, FTF, fyri ársins fyrstu triathlon kapping. Hetta verður eitt so-nevnt sprint triathlon**

TRIATHLON
*Stefan í Skorini*

Í triathlon skulu íðkararnir kappast í svimjing, renning og súkkling. Kappingin sunnudagin er tann triðja, sum FTF skipar fyri í ár, og tað er tann triðja í Grand Prix 2002. Kappast hevur verið tvær ferðir í duathlon, sum er svimjing og renning, men hesuferð skulu íðkararnir súkkla eisini.

Lagt verður fyri við at svimja, síðani verður súkklað og at enda fara luttakararnir í renniskógvarnar. Teinurin í hylinum í Havn er 750 metrar, súkklað verður 20 kilometrar og at enda verður runnið 5 kilometrar. Súkklað verður frá svimjihøllini, oman eftir Eystara Ringvegi, eftir vegnum Yviri við Strond til rundkoyringina við Skansan, har luttakararnir venda. Leiðin gongur síðani niðan til rundkoyringina við R.C. Effersøes gøtu og Eystara Ringveg. Hesin teinurin skal koyrast tríggjar ferðir. Renningin byrjar við Plantusøluna og runnið verður yvir til Føroya Sparikassa Yviri við Strond og niðan aftur til Plantusøluna, har málið er.

Nú tvey umfør í Grand Prix 2002 hava verið, liggur Hallur Stakksund á odda hjá monnum, og Rannvá Jacobsen er fremst hjá kvinnum. Hallur var næstfremst í fyrstu kappingini og vann ta næstu. Hann hevur tí 72 stig tilsamans. Rannvá vann fyrstu kappingina og var nummar tvey í tí næstu kappingini. Hon hevur tí somuleiðis 72 stig.

Kappingin verður sunnudagin klokkan 13, og luttakararnir skulu møta klokkan 12. Tilmelding er hjá Evald Rasmussen á tlf. 31 65 52.

# Junior Buss Taxa føroyameistari


*Vinnandi liðið og føroyameistarar í bridge. Við á liðnum, sum nevnist Junior Buss Taxa, eru Bogi Simonsen, Rói á Rógvu Joensen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen*


*Liðið hjá Jónu Grunnveit flutti upp í 1. deild. Við á liðnum eru eisini Henriette Svenstrup, Jógvan Juel Rasmussen, Eyðun Jensen og Pól Joensen*

**Sjáldan hevur FM kappingin fyri lið verið meir jøvn og spennandi enn hesu ferð. Undan finalu-umfarinum høvdu liðini helvtina av stigunum vunnin í innanhýsisdystunum við sær, og har lógu trý av teimum fýra liðunum púra jøvn**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Sum úrslitini háttaðu seg í Bridgehúsinum um vikuskiftið, varð heldur einki avgjørt, fyrr enn seinasta spæl var liðugt leikt. Uppgerðin vísti tá, at Junior Buss Taxa liðið við Boga Simonsen, Róa á Rógvu Joensen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen var vorðið føroyameistari við bara einum stigi niður til nr. 2, sum vóru føroyameistararnir frá í fjør, liðið hjá Allan Dal-Christiansen. Triðja pláss fór til liðið úr Eysturoynni, Símin Lassaberg, og liðið hjá Carl Mikkelsen endaði sum nr 4.

<u>Úrslitini frá finaluni:</u>

| | |
|---|---|
| Símin Lassaberg - Carl Mikkelsen | 20-10 |
| Junior Buss Taxa - A. Dal-Christiansen | 18-12 |
| A. Dal-Christiansen - Símin Lassaberg | 20-10 |
| Carl Mikkelsen - Junior Buss Taxa | 05-25 |
| Junior Buss Taxa - Símin Lassaberg | 15-15 |
| A. Dal-Christiansen - Carl Mikkelsen | 25-05 |

<u>Endaliga støðan í finaluni:</u>

| | |
|---|---|
| 1. Junior Buss Taxa | 106 |
| 2. Allan Dal-Christiansen | 105 |
| 3. Símin Lassaberg | 93,5 |
| 4. Carl Mikkelsen | 52 |

**Jóna Grunnveit verandi í 1. deild**

Í kappingini um at fáa tað seinna uppflytingarplássið til 1. deild komandi kappingarár eydnaðist liðnum hjá Jónu Grunnveit at fara við sigrinum. Við á liðnum hjá Jónu leiktu eisini Henriette Svenstrup, Jógvan Juel Rasmussen, Eyðun Jensen og Pól Joensen. Liðið hjá Jórun Johannesen, sum fyrr í vetur vann 2.deild, hevði longu frammanundan tryggjað sær hitt uppflytingarplássið til 1. deild.

<u>Úrslitini frá upp- og niðurflytingarbólkinum:</u>

| | |
|---|---|
| Jóna Grunnveit - Øssur Winthereig | 14-16 |
| Hanus Bærentsen - Hans Egil Joensen | 11-19 |
| Hans Egil Joensen - Jóna Grunnveit | 03-25 |
| Øssur Winthereig - Hanus Bærentsen | 13-17 |
| Hanus Bærentsen - Jóna Grunnveit | 09-21 |
| Hans Egil Joensen - Øssur Winthereig | 22-08 |

<u>Endaliga støðan í upp- og niðurflytingarbólkinum</u>

| | |
|---|---|
| 1. Jóna Grunnveit | 60 |
| 2. Hans Egil Joensen | 44 |
| 3. Hanus Bærentsen | 37 |
| 4. Øssur Winthereig | 37 |

Vit skulu her síggja eitt av spølunum, ið spælt var í upp- og niðurflytingarbólkinum.

S/Øll

_ 96
_ KJ63
_ -
_ Q1086532

_ QJ8 _ 4
_ 985 _ 742
_ 10742 _ AJ9865
_ AJ4 _ K97

_ AK107532
_ AQ10
_ KQ3
_ -

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| | Eyðun Jensen | | Jógvan Juel Rasmussen |
| - | - | - | 2kl |
| pass | 3kl | pass | 3sp |
| pass | 4sp | pass | 4ut |
| pass | 5kl | pass | 6sp |
| pass | pass | pass | |

2kl er krav, 3kl er positivt við kleyvara, 4ut spyr eftir essum, og 5kl sigur frá ongum essi.
Tá makkarin einki ess hevði, mátti tað positiva hjá honum vera í onkrum øðrum liti. Tað dámdi Jógani Juel væl, so hann valdi at fara í slemm.
Við trumfi út, fer kontraktin niður, men Vestan valdi at spæla hj9 út. J.J. tók við essinum, trumfaði ein rútara á borðinum, trumfaði ein kleyvara á hondini, trumfaði enn ein rútara og trumfaði síðan enn ein kleyvara. Tá hann nú tók spA og K, sá hann, at har var ein trumftapari. Men kontraktin kundi vinnast, um bara antin kleyvarin ella hjartarin sótu 3-3. Jógvan spældi hj10 til dreingin og trumfaði ein kleyvara. Kleyvarin sat javnt, og Jógvan Juel spældi hjQ til hjK og kundi kasta tann síðsta rútaran uppá tann góðspælda kleyvaran. Nú sat hjartarin eisini 3-3, men J.J. økti um møguleikarnar hjá sær við at spæla uppá kleyvaran eisini. Væl spælt.

# Landsliðið til kapping í Týsklandi

Tá EM landsliðini vóru í Danmark fyri nøkrum vikum síðani, vórðu vit boðin til Týsklands við einum liði at taka lut í tí stóru upphitangarkappingini til EM, teir nevna Nationen Cup. Teir, ið fara avstað, verða Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen. Kappingin verður spæld í Bonn mikudagin og hósdagin 8. og 9. mai. Hjá teimum, sum hava hug at fylgja við, hvussu tað gongur í kappingini, ber til at fara inn á heimasíðuna: www.bridge-club-bonn.de/main/ncup2002/



# Brandur vitjar Bubber



**Miðskeiðis í mai mánaði verður Brandur Enni við í helst best umtóktu barnasendingini í donskum sjónvarpi**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakkstein*

Um vikuskiftið var Brandur Enni í Danmark fyri at gera upptøkur til sendingina »Snurre Snups Søndagsklub«, sum verður send á TV2 sunnumorgnar.

Sendingin verður roknað sum ein tann besta barnasendingin í donskum sjónvarpi, og tað kemur millum annað av, at væl umtókti Bubber er vertur í sendingini.

Nógvir kendir tónleikarar hava vitjað í sendingini, men hetta er fyrstu ferð, at føroyskt navn verður við. Brandur skal saman við dansigentunum syngja nøkur løg, og sjálvandi verður eisini prátað við føroyska tannáringin.

Framførslan í danska sjónvarpinum er ein liður í at fáa Brandur fram uttanlands. Sendingin verður send sunnumorgunin 16. mai millum frá klokkan 9.00 føroyska tíð. Sendingin varðar í stívliga tveir tímar.

# Seinasta innleiðandi umfar í Ársins Songrødd

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



11. mai verður seinasta innleiðandi umfar áðrenn finaluna, sum verður 29. juni í kappingini um ”Ársins songrødd 2002".

Hesa ferð er tað songrøddir úr Vágunum og Vestmanna, sum skulu hava tvey umboð við til finaluna í badmintonhøllina 29. juni. Stóra tiltakið veður í Ítrottarhøllini í Vestmanna 11. mai kl. 11:30.

Fyrireikararnir siga, at ikki minni enn seks ”duettir” verða við, so nógv fólk skulu á pallin hetta kvøldið. Er áhugi fyri at fylgja við í kappingini, er møguleiki at lurta eftir sendingini ”Ársins Songrødd 2002” á Rás 2. Sendingin verður send hvønn mánadag kl 17.00 aftan á eitt innleiðandi umfar hevur verið og endursend leygardagin kl 15.00. Finalan verður send beinleiðis, og Rás 2 fer at gera eina serstaka sending hetta kvøldið. Tær boðar Ruth Reinert og Súsanna Clementsen hava gjørt sendingina.

Aftan á kappingina verður stórt DJ-SHOW við Martin Kjærbo, James Olsen og hannsara dansigentur. Eitt einastandandi kvøld við tónleiki, sangi, royk- og ljósshowi, har áskoðarin m. a. eisini fær møguleika at syngja ”karaoke”.

Luttakararnir eru:
Ása Kathy Dam
Mariann Ivansdóttir
Durita Poulsen
Una Siggertsdóttir/Siri Joensen
Finnur/Elisa Joen-Jacobsen
Laila J.Jacobsen/ Tóra Gudmundsen
Torkil Joensen/Lina Hansen
Vanja S. Jacobsen/Tanja Johansen
Alice Simonsen
Sunneva /Jona




Hjartaliga tøkk til øll tykkum sum stuðlaðu flokkinum og okkum persónliga á løgtingsvalinum 30. apríl

Katrin & Kristian

Tøkk


Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum stuðlaðu Javnaðarflokkin í Norðstreymoy

Serliga vil eg takka tykkum, sum úr øllum bygdunum úr Tjørnuvík til Vestmanna, stuðlaðu mær persónliga

Hans Pauli Strøm

Tøkk


Øllum tykkum eysturoyingum, sum stuðlaðu Sambandsflokkinum til hetta løgtingsvalið takki eg hjartaliga.

Serliga takki eg teimum, ið atkvøddu fyri mær persónliga

Tummas Eli Høj Joensen


Hjartaliga tøkk til tykkum øll sum stuðlaðu Tjóðveldisflokkinum til valið 30. apríl

Ein serlig tøkk til tey sum stuðlaðu mær persónliga

Heini O. Heinesen